

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 12 - 2012

# Asia skjótt alla oljuna úr Miðeystri

Altjóða orkustovnurin, IEA metir, at í 2035 fara 90% av allari olju framleidd í Miðeystri at verða keypt av londum í Asia við Kina og India á odda. Stovnurin sigur somuleiðis, at amerikanska oljuframleiðslan fer at vaksa munandi. Stovnurin vil vera við, at eftirspurningurin eftir orku í heiminum fer at vaksa við meira enn einum triðingi komandi 20 árini. Kina, India og Miðeystur fara at standa fyri 60% av vøkstrinum. Sagt verður eisini, at stóri eftirspurningurin úr Kina serstakliga fer at ávirka oljuprísirnar.